## Blákrossheimið søkir eftir starvsfólki

Søkt verður eftir fólki við hóskandi útbúgving til Blákrossheimið at byrja 1. august 2000.

**Hóskandi útbúgving:**
Sosialráðgevi
Lærari
Sjúkrasystir
Diakon
Pedagogur

Tað er eisini ein fyrimunur, hevur tú eina terapeutiska útbúgving og royndir innan rúsdrekkaviðgerð.

Starvið umfatar í høvuðsheitum viðgerð av rúsevnismisnýtarum. Harumframt eru nøkur praktisk ábyrgdarøki knýtt til starvið. Roknast kann við kvøld- og vikuskiftisvaktum.

Ein treyt er, at viðkomandi gongur inn fyri blákrosshugsjónini, sum bygd er á kristið grundstøði.

Umsóknir skulu vera okkum í hendi sum skjótast, ella í seinasta lagi 1. juni 2000.

Ynskir tú at vita meira, ert tú vælkomin at ringja til leiðaran Sólborg Dulavík á tlf. 315575.

**Blákrossheimið**
Lynggøta 12, Tórshavn

## Rentubroyting

Norðoya Sparikassi hækkar rentuna við gildi frá 1. mai 2000 á flest øllum rentustigum. Eftir rentuhækkingina verða høvuðsrentustigini hesi:

| **Innlán** | **% p.a.** |
|---|---|
| Vanlig konto | 0,25 |
| 3 mðr. uppsøgn | 2,25 |
| 12 mðr. uppsøgn | 3,25 |
| 12 mðr. uppsøgn ábyrgdarar | 3,50 |
| Barnauppsparing | 4,00 |
| Gull 1 | 2,50 |
| Gull 2 | 4,00 |
| Bústaðarkonto | 3,00 |
| + stuðul frá Landsstýrinum | 3,00 |
| Kapitalpensjón | 5,00 |
| Ábyrgdarapeningur | 4,25 |
| **Útlán** | |
| Sethús, 1. veðr., - seriulán | 5,50 |
| Sethús, 1. veðr., - annuitet | 5,75 |
| Sethús, 2. veðr., - seriulán | 7,25 |
| Sethús, 2. veðr., - annuitet | 7,50 |

NORÐOYA SPARIKASSI

# DEKK!

## Søla, skift og avbalansering

**Vit skifta eisini olju og filtur**

## HS Dekk

**v/ Hugo Skorastein
Leirvík
Tlf. 222018**

## Útróðrarbátur til sølu

M/B Havfari 32 ton og egningarskúrur á Stongunum við 120 svøvla línum og 10 aut. snellum, fiskiloyvi í bólki 4a, 30 dagar á Føroya Banka, snelluloyvi í Íslandi, til sølu fyri 950.000 kr.

**Tlf. 457735**

## Rakstrarroknskapur

| 1000 kr. | 1999 | 1998 |
|---|---|---|
| Rentuinntøkur v.m. | 17.105 | 14.610 |
| Rentuútei›slur v.m. | 6.413 | 5.882 |
| **Netto rentuinntøkur** | **10.692** | **8.728** |
| Vinningur av partabrøvum | 53 | 58 |
| Kostna›ur og provisjónsinntøkur | 1.832 | 1.479 |
| **Netto rentu- og kostna›arinntøkur** | **12.577** | **10.266** |
| Vir›isjavnan av vir›isbrøvum og gjaldoyra | -2.683 | 470 |
| A›rar vanligar inntøkur | 21 | 98 |
| **Úrslit av fíggjarpostum** | **9.915** | **10.834** |
| Útrei›slur til starvsfólk og umsiting | 7.351 | 6.388 |
| Av- og ni›urskrivingar av ítøkiligum ognum | 982 | 644 |
| A›rar rakstrarútrei›slur | 694 | 1.165 |
| Tap og burturleggingar | -614 | -206 |
| **Úrslit av vanligum rakstri** | **1.502** | **2.843** |
| A›rar óvanligar inntøkur | 0 | 0 |
| A›rar óvanligar útrei›slur | 0 | 0 |
| **Úrslit av vanligum rakstri undan skatti** | **1.502** | **2.843** |
| Skattur | 533 | 1.161 |
| **Ársúrslit** | **969** | **1.682** |
| **B‡ti av rakstrarúrsliti** | | |
| Ársúrslit | 969 | 1.682 |
| Flutt frá undanfarnum árum | 28.899 | 27.217 |
| Flutt frá ø›rum grunnum | 66 | 169 |
| **Til n‡tslu** | **29.934** | **29.068** |
| Flutt til grunnar | 66 | 169 |
| Framflutt úrslit | 29.868 | 28.899 |
| **Tilsamans** | **29.934** | **29.068** |

## Fíggjarstø›a 31. desember

| 1000 kr. | 1999 | 1998 |
|---|---|---|
| **Ogn** | | |
| Kassapeningur og ogn uttan uppsøgn í tjó›bankum | 4.837 | 3.135 |
| Ogn hjá fíggjarstovnum | 13.012 | 27.715 |
| Útlán | 205.011 | 160.776 |
| Lánsbrøv | 58.846 | 64.900 |
| Partabrøv | 551 | 517 |
| Ítøkiligar ognir | 3.548 | 3.244 |
| A›rar ognir | 40 | 40 |
| Tí›aravmarkingar | 120 | 573 |
| **Ognir tilsamans** | **285.965** | **260.900** |
| **Skuld** | | |
| Skuld til fíggjarstovnar og tjó›bankar | 1.278 | 2.011 |
| Innlán | 250.559 | 225.310 |
| Onnur skuld | 1.461 | 2.215 |
| Tí›aravmarkingar | 0 | 0 |
| Avsetingar til skyldur | 877 | 800 |
| **Eginogn** | | |
| Ábyrgdarpeningur | 722 | 465 |
| Grunnar | 1.200 | 1.200 |
| Flutt frá undanfarnum árum | 28.899 | 27.217 |
| Flutt frá ársúrsliti | 969 | 1.682 |
| **Eginogn tilsamans** | **31.790** | **30.564** |
| **Skuld tilsamans** | **285.965** | **260.900** |
| Tøl, sum ikki eru vi› í fíggjarstø›u | | |
| Ábyrgdir o.a. | 2.505 | 2.426 |

SUÐUROYAR SPARIKASSI

## Leiðari og varaleiðari til Sambýlið á Bóndaheygi 14

Innan Almanna- og Heilsumálastýrið og stovnar undir tí, við fyribils tænastu í Sambýlinum á Bóndaheygi 14 í Havn, er eitt tænastumannastarv sum leiðari og eitt sum varaleiðari leyst at søkja til setan 1. juli ella 1. august 2000.

Størvini verða sett eftir sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Pedagogfelag, leiðarastarvið lønt í lønarflokki 26 + viðbót og varaleiðarastarvið lønt í lønarflokki 20 + viðbót.

Sambýlið er heim hjá 5 fólkum við serligum tørvi. Uppgávan hjá leiðaranum er, saman við starvsfólkunum, at skipa ein tryggan og mennandi gerandisdag fyri íbúgvarnar. Sambýlið skipar fyri bæði arbeiði og frítíðartilboðum til íbúgvarnar. Uppgávan hjá varaleiðaranum er stuðla leiðaranum í leiðsluarbeiðinum og at yvirtaka leiðarans uppgávur, tá hesin ikki er til staðar.

Fyristøðufólkið hevur fakligu, fyrisitingarligu og fíggjarligu ábyrgdina av sambýlinum.

Væntað verður av leiðaranum, at hann á ein leiðandi og virknan hátt, saman við starvsfólkunum kann tryggja sambýlinum eina positiva menning.

Dentur verður lagdur á, at umsøkjarin hevur evni og áræði at ganga nýggjar leiðir á pedagogiska økinum, hevur evni og vilja at samstarva á øllum økjum, er sjónligur í sínum leiðarastarvi og dugir at fáa síni sjónarmið fram.

Væntað verður av varaleiðaranum, at hann hevur samstarvsevni, vilja og evni at fáa arbeiði í gerandisdegnum at ganga so væl sum gjørligt.

Bert fólk við pedagogútbúgving kunnu søkja størvini.

Nærri fæst at vita um størvini við at venda sær til Bjarna Clementsen á tlf. 315426. Umsóknarfreistin er 22. mai 2000.

Umsóknir skulu sendast til:

**Serstovnadeildina**
Sigmundargøta 5
FO-100 Tórshavn

## DUGIR TÚ AT SELJA FISK?

Dugir tú at selja fisk, er tað kanska júst tær, vit leita eftir.

**Vit bjóða tær:**

- eitt starv í eini fyritøku í støðugari menning
- eitt starv við møguleikum fyri persónligari og fakligari menning
- eitt starv innan samskipan av tøku og sølu av laksi
- eitt starv innan samskipan av framleiðslu og sølu av feskum úrdráttum
- eitt starv innan kundarøkt

Til rætta umsøkjaran bjóða vit góða løn og góðar starvstreytir.

**Okkara vón er:**

- at tú hevur náttúrligar eginleikar sum sølufólk
- at tú hevur góð samstarvsevni
- at tú hevur førleika innan vørumenning
- at tú hevur góðan málførleika
- at tú hevur teldukunnleika

Fleiri upplýsingar fáast við at ringja á tlf. 441002 og tosa við Páll Gregersen.

Umsóknarfreistin er 17. mai 2000

Umsóknirnar, ið verða viðgjørdar í trúnaði, skulu sendast til:

P/F PRG Export umsetti í 1999 fyri 161 mió. Fyritøkan selur fisk til Evropeiska meginlandið og Amerika, og arbeiðir í neyvum samstarvi við framleiðsluvirkið P/F Fiskavirkið og alifelagið P/F Luna og selur allar vørurnar fyri hesi feløg.

**PRG EXPORT**
P.O. Box 29 · FO-510 Gøtu · Faroe Islands
Tel +298 441002 · Fax +298 441766

## Landsfundur Sjálvstýrisfloksins

verður hildin á Klaksvíkar tekniska skúla

**leygardagin tann 6. mai 2000 kl. 10.00.**

Dagsskrá sambært lógini.

**Landsfelag Sjálvstýrisfloksins**

## Nýggjar TANNPROTESUR

**Broytingar og umvælingar av gomlum protesum**

Kliniskur tannteknikari
**BERGUR Á REYNATRØÐ**
Børkuvegur, 620 Runavík
**Tlf. 448480**
Opið er mánadag-fríggjadag frá kl. 9-16

## Krani til sølu

FR 14 t. metur, árg. 89 bíliga til sølu.

**Tlf. 213220**

## Meginfelag Útróðrarmanna

Aðalfundur felagsins verður sunnudagin 7. mai kl. 14 á Hotel Hafnia. Umframt føstu skránna sum er ásett í viðtøkunum koma hesi mál fyri.

1. Uppskot um broytingar í viðtøkunum
2. Støðutakan til limagjald til Ráfiskaseljarafelagið
3. Viðgerð av álitið sum arbeiðsbólkur skrivaði við tí endamáli at bøta um inntøkutrygdina.

Skjølini hesum viðvíkjandi eru send til limafeløgini og eru annars at finna á heimasíðu okkara www.megf.fo undir síðuni »Kunning MÚ«.

**Meginfelag Útróðrarmanna**